Tilfeingis- og vinnumálaráðið

Dagfesting:	05.01.2026
Mál nr.:	22/19276
Málsviðgjørt:	uak/gál/ást
Ummælistíð:	09.10.2025- 03.11.2025
Eftirkannað:	11.12.2025

Uppskot til

Løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um Føroya Altjóða Skipaskrá
(Herd krøv til umboðsfólk og víðkað heimild at strika skip úr Føroya Altjóða Skipaskrá)

§ 1

Í løgtingslóg nr. 78 frá 10. mars 1992 um Føroyska Altjóða Skipaskrá sum broytt við løgtingslóg nr. 82 frá 13. mai 1992, løgtingslóg nr. 62 frá 14. mai 1997,løgtingslóg nr. 80 frá 13. november 1998, løgtingslóg nr. 41 frá 7. mai 2010, løgtingslóg nr. 54 frá 26. mai 2011 og løgtingslóg nr. 51 frá 15. mai 2014, verða gjørdar hesar broytingar:

1. § 1, stk. 2 verður orðað soleiðis:

"*Stk. 2*. Fyri at skip skal kunna metast sum føroyskt og sigla undir føroyskum flaggi, skal eigarin ella leigarin, samanber § 7, stk. 2, vera føroyskur. Sum føroyskur eigari ella leigari verður mettur partafelag, smápartafelag ella vinnurekandi grunnur, skrásett í Skráseting Føroya."

2. Aftan á § 1 verður sett:

"**§ 1 a.** Um tann ella teir fysisku persónar, sum sambært løgtingslóg um parta- og smápartafeløg ella anordning om ikrafttræden for Færøerne af lov om erhvervsdrivende fonde eru skrásettir sum eigarar í tí felagi ella vinnurekandi grunni, ið er eigari ella leigari sambært § 1, stk. 2, ikki eru búsitandi í Føroyum, skal viðkomandi skrivliga til skipaskrásetingina tilnevna eitt umboðsfólk. Umboðsfólkið skal vera búsitandi í Føroyum.
Stk. 2. Umboðsfólkið skal vegna felagið ella vinnurekandi grunnin taka ímóti kunnuggering og stevningum og skal hava fulltrú at handla vegna felagið ella vinnurekandi grunnin mótvegis skipaskrásetingini umframt at hava ábyrgdina av, at tær skyldur, sum eru lagdar á felagið ella vinnurekandi grunnin sambært hesi løgtingslóg ella reglum, ásettar við heimild í hesi løgtingslóg, verða hildnar."

3. Í § 5, stk. 2 verður aftan á "eigaranum" sett: "ella leigaranum".

4. § 8 verður orðað soleiðis:

"**§ 8.** Eigari ella leigari av skipi, sum er skrásett í Føroysku Altjóða Skipaskránni, skal fráboða viðurskifti, sum kunnu hava týdning fyri ta framhaldandi skrásetingina."

5. § 10 verður orðað soleiðis:

"**§ 10.** Skip, sum ikki longur lýkur treytirnar fyri skráseting eftir § 1, verður strikað úr Føroysku Altjóða Skipaskránni.
Stk. 2. Skip kann harumframt verða strikað úr Føroysku Altjóða Skipaskránni, um §§ 4, 8 ella 10 b ikki verða hildnar.
Stk. 3. Skip, sum ikki longur lýkur treytirnar fyri at vera skrásett í Føroya Altjóða Skipaskrá, men lýkur treytirnar at verða skrásett í Føroya Skipskrá, verður flutt til Føroya Skipaskrá við øllum skrásettum rættindum og byrðum."

6. Í § 10 a, stk. 1 verður aftan á "Eigari" sett: "ella leigari av skipi".

7. § 10 b, stk. 1 verður orðað soleiðis:

"Eigari ella leigari av skipi, skrásett í Føroya Altjóða Skipaskrá, skal gjalda Sjóvinnustýrinum eitt árligt gjald fyri hvørt skipið til at figgja uppgávur eftir sjóvinnulóggávuni, sum Sjóvinnustýrið røkir viðvíkjandi skipum, skrásett í Føroya Altjóða Skipaskrá. Árliga gjaldið verður ásett við støði í aldri og stødd á skipinum."

8. § 12, stk. 1 verður orðað soleiðis:

"Um ikki harðari revsing er ásett eftir aðrari lóg, verður tann revsaður við sekt, sum tilætlað ella av grovum ósketni ikki heldur §§ 4 ella 8."

§ 2

Stk. 1. Henda løgtingslóg kemur í gildi dagin eftir, at hon er kunngjørd.
Stk. 2. § 1, nr. 2 er eisini galdandi fyri felag ella vinnurekandi grunn, sum hevur skip skrásett, tá ið løgtingslógin kemur í gildi.

Kapittul 1. Almennar viðmerkingar

1.1. Orsakir til uppskotið

Føroya Altjóða Skipaskrá, FAS, er ein altjóða skipaskrá, sum síðani 2011 hevur verið á hvítalista hjá Paris MoU. Fyri at varðveita plássið á hvítalista er avgerandi, at skipini í FAS eru væl rikin og lúka øll altjóða krøv.

Í 2021 setti landstýrið sær fyri at kanna, um neyðugt er við broytingum í løgtingslóg um FAS til tess at forða fyri, at FAS-skipanin verður misnýtt, eftir tvey mál um svik møguliga høvdu tilknýti til FAS. Kanningin vísti, at málini vóru ikki um skip skrásett í FAS. Sum heild varð mett, at galdandi ásetingar í løgtingslóg um FAS virkaðu væl, eisini í teimum førum, har útlendingar burturav eru eigarar ella leigarar av skipunum. Samstundis varð mett, at galdandi krøv til umboðsfólk eftir FAS-kunngerðini í ávísan mun vóru ógreið, og at heimildin at strika skip úr FAS átti at verða víðkað.

1.2. Galdandi lóggáva

Umboðsfólk

Sambært kunngerð nr. 83 frá 19. mai 1992 um Føroyska Altjóða Skipaskrá (FAS-kunngerðin) skal eigarin tilmelda umboðsfólk í sambandi við skráseting í FAS. Kunngerðin ásetir, at umboðsfólkið eigarans vegna skal kunna taka sær av teimum skyldum, sum eru lagdar á eigaran sambært løgtingslóg um Føroyska Altjóða Skipaskrá, og skal tryggja, at reglurnar í kunngerðini somuleiðis verða hildnar. Umboðsfólkið skal vera búsitandi í Føroyum.

Kunngerðin ásetir harafturat, at til ber at víkja frá kravinum um at tilmelda umboðsfólk, um eigarin av skipinum er búsitandi í Føroyum, ella um stjóri ella nevndarlimur í felagnum, sum eigur skipið, er búsitandi í Føroyum, og viðkomandi sambært viðtøkum felagsins kann tekna felagið og hevur ábyrgdina av teimum skyldum, sum eru hjá reiðarínum sambært løgtingslóg um FAS.

Galdandi løgtingslóg um FAS ásetir, at fyri at eitt skip skal kunna metast sum føroyskt og sigla undir føroyskum flaggi, má eigarin vera føroyskur. Ásett er, at partafelag, smápartafelag ella vinnurekandi grunnur, sum eru skrásett í Skráseting Føroya, verða mett sum føroyskur eigari. Ásetingin hevur við sær, at útlendingar burturav kunnu vera eigarar av skipum skrásett í FAS, um teir hava stovnað føroyskt partafelag, smápartafelag ella ein vinnurekandi grunn.

Fram til 1998 var krav um umboðsfólk ásett í løgtingslógini, tá ið talan var um útlendsk skip, ið vóru skrásett í FAS. Samanborið við galdandi áseting í FAS-kunngerðini, var áður galdandi áseting í FAS-lógini meira ítøkilig í mun til skyldurnar hjá umboðsfólkinum.

Heimild at strika skip út FAS

Sambært § 10, stk. 1 og 2, í løgtingslóg um FAS kann skip verða strikað úr FAS, um treytirnar fyri skráseting eftir løgtingslógini ikki longur eru loknar. Galdandi ásetingar um at strika skip úr FAS hava verið í gildi, síðani løgtingslógin kom í gildi í 1992.

Í einstøkum føri hevur Sjóvinnustýrið mett, at skip eigur at verða strikað úr FAS vegna vantandi fráboðan um broytt viðurskifti og vantandi rindan av gjøldum. Sambært galdandi løgtingslóg er tó ikki heimild at strika skip úr FAS grundað á slíkar umstøður.

Nágreina áseting um eigarar og leigarar
Eftir løgtingslógini eru skyldur ásettar í §§ 1, 5, 8, 10 a og 10 b, har bert eigari er nevndur. Hetta kann elva til ivamál, tá ið ræður um leigarar og bareboatskráseting. Lagt verður tískil upp til at nágreina §§ 1, 5, 8, 10 a og 10 b soleiðis, at tær vísa til bæði eigara og leigara av skipi, sum er skrásett í FAS

1.3. Endamálið við uppskotinum

Umboðsfólk
Mett verður, at ábyrgdin hjá umboðsfólkinum fyri virkseminum í føroyska felagnum eigur at vera greiðari og ásett í lóg. Umboðsfólkið skal kunna virka sum bindilið millum føroysku myndugleikarnar og útlendska reiðaríið, og skal kunna ábyrgdast í teimum førum, at útlendska reiðaríið ikki heldur sínar skyldur eftir løgtingslógini.

Tískil verður skotið upp, at umboðsfólkið skal vegna felagið ella vinnurekandi grunnin taka ímóti kunnuggering og stevningum og hava fulltrú at handla vegna felagið ella vinnurekandi grunnin mótvegis skipaskrásetingini umframt at hava ábyrgdina av, at tær skyldur, sum eru lagdar á felagið ella vinnurekandi grunnin eftir hesi løgtingslóg ella reglum ásettar við heimild í løgtingslógini, verða hildnar.

Heimild at strika skip úr FAS verður víðkað
Við atliti til at tryggja, at FAS framhaldandi er ein dygdargóð og kappingarfør skipaskrá, verður mett neyðugt at víðka heimildirnar hjá skipaskrásetingini at strika skip úr FAS.

Skotið verður upp, at skip kann verða strikað úr FAS, um reiðarin ikki livir upp til sína fráboðanarskyldu eftir § 8. Eisini verður skotið upp, at skip kann verða strikað úr FAS, um reiðarin ikki rindar lógaráløgdu gjøldini sambært § 10 b. Tað hevur sostatt ítøkiligar avleiðingar ikki at lúka sínar skyldur eftir lógini. Í hesum sambandi skal verða víst á, at striking verður mett at vera eitt stórt inntriv og skal bert setast í verk, tá ið øll onnur rímilig stig eru tikin.

Nágreina áseting um eigarar og leigarar
Ásetingarnar, har tað bert verður víst til eigara, verða broyttar soleiðis, at tær fevna um bæði eigarar og leigarar av skipi.

1.4. Samandráttur av nýskipanini við uppskotinum
Við uppskotinum verða krøvini til umboðsfólkið ásett í løgtingslógini. Heimildin hjá skipaskrásetingini at strika skip úr FAS verður somuleiðis víðkað. Við hesum kunnu skip verða strikað, um tey ikki lúka krøv um gjald og fráboðan um viðurskifti, sum kunnu hava týdning fyri ta framhaldandi skrásetingina.

Víðkaða heimildini at strika skip úr FAS og herdu krøvini til umboðsfólkið verða mett at vera eitt týdningarmikið stig til at varðveita FAS sum eina dygdargóða skipaskrá og harvið framhaldandi at varðveita føroyska flaggið á hvítalista hjá Paris MoU. Samstundis kunnu hesi krøv verða við til, at einans ábyrgdarfull og góðskudygg reiðarí velja at flagga til FAS.

Ásetingarnar um gjøld fyri ávikavist upptøku í FAS og ársgjald verða broyttar soleiðis, at tær fevna um bæði eigarar og leigarar av skipum.

1.5. Ummæli og ummælisskjal
Felagið Peningastovnar og Reiðarafelagið fyri handilsskip hava latið viðmerkingar.

Felagið Peningastovnar vísti á, at tey taka undir við, at FAS reglurnar verða herdar. Felagið hevði viðmerkingar til ásetingar um eigara í § 1 a. Tilfeingis- og vinnumálaráðið hevur hugt nærri at § 1 a og broytt orðingarnar í § 1 a, soleiðis at orðingin nú vísir til felagið ella vinnurekandi grunnin.

Reiðarafelagið fyri handilskip vísti á, at løgtingslógaruppskotið leggur upp til, at umboðsfólk kunnu koma undir ábyrgd fyri viðurskifti, sum tey í nógvum førum als ikki fáa stýrt ella í onkrum føri illa fáa stýrt. Reiðarafelagið fyri handilsskip mælti til, at tað verður ítøkiliga ásett í løgtingslógini, at umboðsfólkið hevur skyldu til at ansa eftir, at brot ikki verður framt á hesar ásetingar, og at viðkomandi kann revsast fyri brot á tær.

Tilfeingis- og vinnumálaráðið tekur undir við, at tað er umráðandi, at tað er greitt fyri umboðsfólk, nær tað kann koma undir ábyrgd. Tilfeingis- og vinnumálaráðið hevur tískil broytt revsiásetingina í § 12, soleiðis at hon bert fevnir um brot, sum eru framd við vilja ella við grovum ósketni. Sekt krevur sostatt vilja ella grovt ósketni frá umboðsfólki. Tilfeingis- og vinnumálaráðið metir tað verða neyðugt og rímiligt, at grovt ósketni og vilji hjá umboðsfólki ikki at halda skyldur eftir §§ 4 ella 8, hevur við sær sekt.

Reiðarafelagið fyri handilsskip vísti eisini á, at uppskotið nýtti málberingina, *tryggan skiparakstur*, sum treyt fyri skráseting, hóast tað ikki stendur sum treyt eftir lógini. Tilfeingis- og vinnumálaráðið skal vísa á, at málberingin er strikað úr uppskotinum.

Reiðarafelagið fyri handilsskip vísti á, at tey meta tað ikki vera rætt, at Sjóvinnustýrið frameftir skal kunna krevja umboðsfólk eftir ógoldnum ársgjøldum, sum reiðaríið hevur skyldu til at rinda. Reiðafelagið vísti samstundis á, at heimild longu er at innheinta skuld frá reiðarínum, og at hetta eisini er vanligur og væl kendur háttur hjá almennum myndugleikum at innheinta skuld.

Tilfeingis- og vinnumálaráðið skal vísa á, at felagið ella vinnurekandi grunnurin hevur ábyrgd av at halda skyldur eftir løgtingslógini, og heimild er at innheinta skuld við panti. Løgtingslógin ásetir, at umboðsfólkið somuleiðis skal hava ábyrgd av teimum skyldum, sum liggja á felagnum ella vinnurekandi grunninum eftir løgtingslógini. Undir hetta kemur eisini skylda at rinda gjøld. Í mun til revsing er nú ásett, at sekt eftir § 12, stk. 1, krevur, at viðkomandi, undir hesum umboðsfólk, við vilja ella við grovum ósketni ikki heldur §§ 4 ella 8.

Reiðarafelagið fyri handilsskip vísti á, at eftir uppskotinum kunnu skip verða strikað úr FAS, um ársgjald ikki er rindað. Reiðarafelagið fyri handilsskip setti spurnartekin við, um tiltakið er ov víðfevnt. Reiðarafelagið fyri handilsskip vísti á, at undir øllum umstøðum eigur reiðarí at fáa áminningar um, at reiðaríið hevur skuld til Sjóvinnustýrið, áðrenn so víðfevnd stig verða tikin, sum tað er at strika skip.

Tilfeingis- og vinnumálaráðið skal vísa á, at í viðmerkingunum til ásetingina verður víst á, at striking m.a. vegna vantandi gjald verður mett sum eitt stórt inntriv. Tí skal heimildin nýtast við varsemi og aftan á, at skipaskrásetingin hevur troytt øll onnur stig fyri at fáa viðurskiftini í rættlag. Eisini er ásett í § 10, stk. 2, at skip, sum ikki longur lýkur treytirnar fyri at vera skrásett í Føroya Altjóða Skipaskrá, men lýkur treytirnar at verða skrásett í Skipskránni, verður flutt í Føroya Skipaskrá við øllum skrásettum rættindum og byrðum.

Kapittul 2. Avleiðingarnar av uppskotinum

2.1. Fíggjarligar avleiðingar fyri land og kommunur
Uppskotið hevur ikki fíggjarligar avleiðingar fyri land og kommunur.

2.2. Umsitingarligar avleiðingar fyri land og kommunur
Við uppskotinum verður heimildin hjá skipaskrásetingini at strika skip úr FAS víðkað. Mett verður ikki, at heimildin sum so hevur umsitingarligar avleiðingar fyri Sjóvinnustýrið, ið umsitur skipaskrásetingina. Mett verður neyðugt at gera broytingar í kunngerð nr. 83 frá 19. mai 1992 um Føroyska Altjóða Skipaskrá, sum avleiðing av broytingunum í hesum uppskoti.

Uppskotið hevur ikki umsitingarligar avleiðingar fyri kommunur.

2.3. Avleiðingar fyri vinnuna
Møguliga er neyðugt hjá felagi ella vinnurekandi grunni at broyta í viðtøkum ella øðrum, soleiðis at umboðsfólkið kann taka ímóti kunnuggering og stevningum og hava fulltrú at handla vegna felagið ella vinnurekandi grunnin mótvegis skipaskrásetingini. Sambært heimasíðuni hjá Skráseting Føroya er kostnaðurin fyri fráboðan av broytingum 1.000 kr.

Ásett verður, at umboðsfólkið hevur somu skyldur sum felagið ella vinnurekandi grunnurin fyri viðurskifti, sum eru fevnd av løgtingslógini. Umboðsfólkið skal m.a. ansa eftir, at Skipaskrásetingin fær fráboðan um viðurskifti, sum kunnu hava týdning fyri framhaldandi skráseting.

2.4. Avleiðingar fyri umhvørvið
Uppskotið hevur ikki avleiðingar fyri umhvørvið.

2.5. Avleiðingar fyri serstøk øki í landinum
Uppskotið hevur ikki avleiðingar fyri serstøk øki í landinum.

2.6. Avleiðingar fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir
Uppskotið hevur ikki avleiðingar fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir.

2.7. Millumtjóðasáttmálar á økinum
Uppskotið hevur ikki avleiðingar fyri millumtjóðasáttmálar á økinum.

FAS skipanin er fevnd av fleiri millumtjóða sáttmálum m.a. ILO 87 og 98, MLC-sáttmálanum, SOLAS, MARPOL o.fl.. Eingin teirra verður ávirkaður av løgtingslógaruppskotinum.

2.8. Tvørgangandi millumtjóðasáttmálar
Mett verður, at løgtingslógaruppskotið er í samsvari við *Evropeiska mannarættindasáttmálan*, sambært anordning nr. 136 af 25. februar 2000 om ikrafttræden for Færøerne af lov om den europæiske menneskerettighedskonvention, og *Sáttmála Sameindu Tjóða um rættindi hjá einstaklingum, ið bera brek,* sambært bekendtgørelse nr. 35 af 15. September 2006 om rettigheder for personer med handicap. Mett verður, at løgtingslógaruppskotið eisini er í samsvari við *Hoyvíkssáttmálan* (sáttmáli millum stjórn Íslands øðrumegin, og stjórn Danmarkar og Føroya landsstýri hinumegin), vísandi til, at krøvini, sum eru sett føroyskum ríkisborgarum, eru javnsett við íslendskar ríkisborgarar. Viðkomandi er at vísa á, at krøvini til skip hjá føroyskum og íslendskum ríkisborgarum eru tey somu.

2.9. Markaforðingar
Mett verður ikki, at løgtingslógaruppskotið fer at elva til markaforðingar.

2.10. Revsing, fyrisitingarligar sektir, pantiheimildir ella onnur størri inntriv
Við uppskotinum víðkast heimildin hjá skipaskrásetingi at strika skip úr FAS. Uppskotið fevnir ikki um nýggjar ásetingar um revsing, fyrisitingarliga sekt ella pantiheimild.

2.11. Skattir og avgjøld
Uppskotið hevur ikki ásetingar um skattir ella avgjøld.

2.12. Gjøld
Uppskotið hevur ikki ásetingar um nýggj gjøld.

2.13. Áleggur løgtingslógaruppskotið likamligum ella løgfrøðiligum persónum skyldur?
Skotið verður upp, at umboðsfólk frameftir skal kunna taka ímóti kunnuggering og stevningum og hava fulltrú at handla vegna felagið ella vinnurekandi grunnin.

2.14. Leggur løgtingslógaruppskotið heimildir til landsstýrisfólkið, ein stovn undir landsstýrinum ella til kommunur?
Uppskotið leggur ikki heimildir til landsstýrisfólkið.

2.15. Gevur løgtingslógaruppskotið almennum myndugleikum atgongd til privata ogn?
Uppskotið gevur ikki almennum myndugleikum atgongd til privata ogn.

2.16. Hevur løgtingslógaruppskotið aðrar avleiðingar?
Uppskotið hevur ikki aðrar avleiðingar enn tær, sum longu eru nevndar omanfyri.

2.17. Talvan: Yvirlit yvir avleiðingarnar av løgtingslógaruppskotinum

	Fyri landið ella landsmyndug-leikar	Fyri kommunalar myndugleikar	Fyri pláss ella øki í landinum	Fyri ávísar samfelags-bólkar ella felagsskapir	Fyri vinnuna
Fíggjarligar ella búskaparligar avleiðingar	Nei	Nei	Nei	Nei	Ja
Umsitingarligar avleiðingar	Ja	Nei	Nei	Nei	Ja
Umhvørvisligar avleiðingar	Nei	Nei	Nei	Nei	Nei
Avleiðingar í mun til altjóða avtalur og reglur	Nei	Nei	Nei	Nei	Nei
Sosialar avleiðingar			Nei	Nei	

Kapittul 3. Serligar viðmerkingar

3.1. Viðmerkingar til ta einstøku greinina

Til § 1

Til nr. 1
Talan er um at nágreina ásetingina í § 1, stk. 2 soleiðis, at hon vísir til bæði eigara og leigara av skipi.

Til nr. 2
Ásetingin byggir á galdandi krav í kunngerð nr. 83 frá 19. mai 1992 um Føroyska Altjóða Skipaskrá um at tilnevna umboðsfólk. Krav um umboðsfólk verður galdandi, tá ið eigararnir ella leigararnir í tí felagi ella vinnurekandi grunni, sum er skrásett, ikki eru búsitandi í Føroyum.

Samanborið við galdandi krav í kunngerðini verða krøvini til umboðsfólkið eftir stk. 2 herd. Sum útgangsstøði hevur reiðaríið ábyrgdina av at halda skyldur, boða frá og rinda gjøld og sektir eftir løgtingslógini.

Við hesum verður ítøkiliga ásett, at umboðsfólkið somuleiðis hevur ábyrgdina av teimum skyldum, sum liggja á felagnum ella vinnurekandi grunninum eftir løgtingslógini. Umboðsfólkið skal m.a. ansa eftir, at Skipaskrásetingin fær fráboðan um viðurskifti, sum kunnu hava týdning fyri framhaldandi skráseting.

Eisini verður greitt ásett, at umboðsfólkið skal kunna taka ímóti kunnuggering og stevningum vegna felagið ella vinnurekandi grunnin og hava fulltrú at handla vegna felagið ella vinnurekandi grunnin.

Ásett verður, at umboðsfólk skulu halda skyldur, sum eru lagdar á felagið ella vinnurekandi grunnin eftir løgtingslógini. Hetta merkir m.a., at umboðsfólkið kann revsast eftir § 12, um tað tilætlað ella av grovum ósketni ikki heldur § 4 og § 8.

Til nr. 3 og 4
Talan er um at nágreina §§ 5 og 8 soleiðis, at tær vísa til bæði eigara og leigara av skipi, sum er skrásett í FAS.

Til nr. 5
Ásett verður, at afturat galdandi heimildum at strika skip úr FAS, verða skip strikað úr FAS, um krøvini sambært §§ 4, 8 ella 10 b, ikki eru lokin.

Striking m.a. vegna vantandi gjald verður mett sum eitt stórt inntriv. Tí skal heimildin nýtast við varsemi og eftir, at skipaskrásetingin hevur troytt øll onnur stig fyri at fáa viðurskiftini í rættlag.

Ásetingin í § 10, stk. 2, verður umorðað soleiðis, at ásetingin ikki vísir beinleiðis til leiðaran á Skipaskránni. Viðkomandi, sum ikki heldur §§ 4, 8 ella 10 b kann vera persónur við tilknýti til skipið, sum er skrásett í FAS; tað er partafelag, vinnurekandi grunnur, umboðsfólk o.t.

Í § 10, stk. 3, verður ásetingin broytt soleiðis, at skip, sum ikki longur lúka treytirnar at vera skrásett í FAS, kunnu flytast í Føroya Skipaskrá, um skipið lýkur treytirnar fyri at verða skrásett í Føroya Skipaskrá.

Til nr. 6 og 7
Talan er um at nágreina §§ 10 a og 10 b soleiðis, at tær vísa til bæði eigara og leigara av skipi, sum er skrásett í FAS.

Til nr. 8
Ásetingin verður broytt soleiðis, at tann verður revsaður við sekt, sum tilætlað ella av grovum ósketni ikki heldur § 4 og § 8. Ósketni, sum ikki er at meta sum grovt ósketni, verður frameftir ikki sektað.

Til § 2
Áseting um gildiskomu. Sambært ásetingini kemur løgtingslógin í gildi dagin eftir, at hon er kunngjørd.

Samstundis verður gjørt greitt, at ásetingar um umboðsfólk eisini galda fyri eigarar og leigarar, sum longu hava skip skrásett, tá ið løgtingslógin kemur í gildi.

Tilfeingis- og vinnumálaráðið, 5. januar 2026

Eirikur í Jákupsstovu
landsstýrismaður

/ Pól Egholm

Yvirlit yvir fylgiskjøl:
Fylgiskjal 1: Javntekstur
Fylgiskjal 2: Viðmerkingar frá Felagnum Peningastovnar
Fylgiskjal 3: Viðmerkingar frá Reiðarafelagnum fyri handilsskip